TING-HELLAN

# Tey smíða lóg

TINGHELLUKLUMMA

HEÐIN D. POULSEN
Løgfrøðingur



Um borgararnir ikki taka lógina til sín, so eru vánirnar lítlar fyri, at hon fer at verða hildin. Tí er alneyðugt, at tað verður farið rætt fram

Í november í fjør gjørdi Føroya Pedagogfelag alment vart við sína ónøgd, tí landsstýrismaðurin bar uppskot í Løgtingið, uttan at felagið hevði verið við at tilevna uppskotið. Víst var á, at uppskotið hevði avleiðingar fyri økið hjá felagnum, og tá átti felagið at luttikið í lógararbeiðinum.

Uppskotið varð samtykt, men landsstýrismaðurin skapti sær óneyðugar óvinir.

Tá uppskotið um lóg um trygd á sjónum varð lagt fyri Løgtingið í 2001, var hetta úrslit av samstarvi millum fleiri partar. Sambært samgonguskjalinum skuldi skipaeftirlitið yvirtakast og í hesum sambandi skuldi lóg gerast. Arbeiðssetningur orðaði uppgávuna og ásetti at nevnd umboðandi partarnar, ið høvdu tilknýti til málsøkið, skuldi setast. Nevndin lat úr hondum bókina "Trygd á Sjónum", sum lýsti hvussu uppgávan kundi loysast; og meðan restin av samgonguni bardist við fullveldi, varð skipaeftirlitið yvirtikið, og løgtingslóg samtykt.

Hevði politiski myndugleikin valt ikki at seta eina nevnd, kann hugsast, at úrslitið møguliga hevði fingið somu lagnu sum fullveldið.

Landsstýrið hevur tað útinnandi valdið, og sjálvt um Løgtingið hevur tað løggevandi valdið, so er tað í allarflestu førum landsstýrið, ið tilevnar lógaruppskotini. Tað er sostatt ein lítil skari av embætisfólki, sum skriva allar landsins lógir. Tískil kundi hugsast, at tað hevði verið ein kærkomin fyrimunir fyri hesar lógarsmiðir at fingið ókeypis ráðgeving frá aktørum á økinum, so sum pedagogfelagnum í omanfyrinevnda føri.

Fyriuttan ókeypis ráðgeving og glaðar borgarar, so eru tað borgararnir, ið geva eini lóg legitimitet. Heldur borgari hánt um eina lóg, og missir virðing fyri henni, fer hann at finna hol ella bróta lógina. Sjálvt um lógir flest hava sanktiónir (tann, ið brýtur lógina, fær t.d. bót ella missir loyvi), so er ætlanin ikki, at sanktiónir skulu noyða stórar skarar av fólki at makka rætt.



*Fólkið tykist ikki at hava tikið ásetingarnar um ferðslu á hesum staði til sín*

Sanktiónir eru fyri at fáa tey síðstu "tungu" við.

Ein lóg missir legitimitetin, um borgarar í stórum tali venda lógini bakið; einkult men lýsandi dømi um áseting, ið misti legitimitet, var avgerðin broyta ferðsluna rundan um springvatnið í Gongugøtini í Tórshavn. Í langa tíð var loyvt at koyra runt um springvatnið, sum var springvatnið ein rundkoyring. Knappuliga, uttan ávaring, kunning ella hoyring, avgjørdi onkur myndugleiki at seta forboð. Bilar, sum komu omaneftir gongugøtuni, skuldu nú fara til høgru oman Sverrisgøtu og teir sum komu oman Sverrisgøtu, máttu nú til vinstru oman gongugøtuna. Úrslitið er einfalt, borgarin fekk hvørki eyga á tær nýggju hvítu strikurnar ella tað skilagóða í at avmarka ferðsluna. Tí velja fólkdagliga at bróta lógina og harvið ikki geva ásetingini legetimitet.

Tað kann vera skilagott at taka onnur uppá ráð, tá lóg verður skrivað. Áhugabólkar og partar, sum lóg viðkemur, kunnu við teirra vitan og royndum gera lógirnar betri. Harafturat gerast borgarar, ið hava havt ávirkan, loyalir móti lógaruppskotum, tá tað seinni gerst galdandi lóg.

# Møguliga bowlinghøll í Vági

Óváttað tíðindi siga, at ætlanir eru um bowlinghøll í Vági. Sunnudagin skal aðalfundurin hjá TB taka støðu til uppskot um bowlinghøll á Tvøroyri




FRÍTÍÐ

Í eina tíð hava leysasøgur vilja verið við, at ætlanir eru um bowlinghøll í Vági. Tað sigst, at í einum stórum bygningi á bryggjuøkinum eru ætlanir at hýsa høllini. Men eigararnir vilja ikki vátta tíðindini.

Men um so er, so er óivað møguligt at hava høllina lidna til jóansøku, sum søgurnar eisini hava viljað verið við, at ætlanin er. Húsini eru stór og í góðum standi og at leggja bowlimgbanar tekur óivað ikki so langa tíð, tá umstøðurnar annars eru góðar.

Men hesi tíðindi eru ikki váttað.

Hinvegin stendur fast, at sunnudagin hevur TB aðalfund og á skránni er m.a. bygging av bowlinghøll, sum ein fyrireikingarbólkur hevur kannað og fyrireikað.

-do-

# Blanding í VB húsinum

Leygarkvøldið er væl blandaður tónleikur á skránni í VB húsinum, tá bólkurin Ein Blanding fer á pallin

TÓNLEIKUR

Leygarkvøldið verður dansur í VB húsinum í Vági. Tað er bólkurin Blanding, ið fer á pallin. Bólkurin spælir bæði eldri og nýggjari tónleik og hevur eisini lagt seg eftir at taka tað besta, sum er frammi júst nú, við í sangskránna.

Ein blanding er bland av royndum tónleikarum, sum hava áralangar royndir úr øðrum bólkum, og sum sameina royndirnar í eini góðari blanding, ið er bæði lurtara- og dansivinarlig.